## Coldwater letur aftur

Coldwater Seafood, sum er dóttirfelag hjá íslendska felagnum Icelandic Group, hevur gjørt av at lata aftur virkið, sum felagið hevur í býnum Redditch. Samráðingar hava verið við tey lokalu fakfeløgini síðani í mars um uppsagnartíð og annað, og partarnir eru nú samdir um, at virkið letur aftur tann 6. juni. Virkið í Redditch hevur framleitt lidnar rættir, og framleiðslan verður nú flutt til virkið hjá Coldwater Seafood í Grimsby.



## Skulu basa inflasjónini

Á fundi í Reykjavík í gjár samdust umboð fyri stjórnina og vinnulívið um at taka neyðug tøk fyri at basa inflasjónini. Partarnir samdust eisini um at lata serfrøðingar gera uppskot um, hvat skal gerast, og tey skulu so umrøðast á næsta felags fundinum, sum verður í summar. Aftan á fundin í gjár kom fram, at partarnir høvdu millum annað umrøtt sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum og møguleikan at útvega betri fíggingarmøguleikar til vinnulívið.

# SEV



*SEV hevur latið byggja ein veg, sum gongur suður um Norðskálatunnilin eystaru megin, og hetta er ein partur av fyrireikingunum til Eiði2 verkætlanina hjá elfelagnum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Fólk í Sundalagnum eru hørm um, at áirnar verða turrlagdar, og nú hava tey tikið stig til at heita á SEV um at taka fyrilit og sleppa "alt ella einki" hugburðinum*

# Grøn orka eigur at taka fyrilit

**- SEV eigur at kenna tað sum sína skyldu ikki bert at framleiða grøna orku, men eisini at hava fyrilit fyri, hvussu landslagið sær út, eftir at vatnorkuútbyggingin er liðug, siga stigtakararnir til mótmælisskrivið**

MÓTMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í fylgiskjalinum, sum tey, ið mótmæla vatnorkuútbyggingini hjá SEV, hava lagt við undirskriftunum, verður víst á, at tær norðaru áirnar av Eiði og suður móti Norðskála, vórðu tiknar í samband við Eiði1 verkætlanina miðskeiðis í áttatiárunum.

- Her varð loyvi givið til at taka allar áðirnar, siga tey.

Lagt verður aftrat, at á heysti í 2006 fekk SEV endaligt loyvi til at taka allar áirnar í norðara parti av Eiði2 økinum, sum røkkur ein hálvan kilometur suður um tunnilsmunnan við Norðskála.

- Tað undrar okkum, at tað er komið so langt, at loyvi er givið at taka allar áirnar í økinum frá Eiðisvatni og suður um tunnilsmunnan við Norðskála. Hetta er ein teinur, sum er 9,1 kilometrar langur.

Í fylgiskjalinum verður spurt, hvussu tað hongur saman, at kommunur og friðingarnevndir eru komnar til ta niðurstøðu, at eingin av teimum mongu áunum í hesum stóra øki eru verdar at varðveita.

- Vit undrast yvir, hvat fekk bygdaráðið at geva slík loyvi og harvið síggja burtur frá at verja landslagið og náttúruna í nærumhvørvinum.

Tey halda, at ein avtala millum Sunda kommunu og SEV – í 21. øld – hóskandi átti at gjørt upp við ein "alt ella einki" hugburð, sum hevur verið ráðandi innan hetta økið.

- Avtalan átti sjálvsagt at tikið atlit til, at onkur av áunum í bygdum øki vórðu varðveittar.

Í fylgiskjalinum verður víst á, at nýggj náttúruverndarlóg um stutta tíð verður sett í gildið fyri Føroyar.

- Vit seta okkara vón til, at SEV nú í 2008 – sjálvt um øll loyvi eru givin – dugir sær høgv og kennir tað sum sína skyldu ikki bert at framleiða grøna orku, men eisini hevur eyga fyri, hvussu landslagið sær út, eftir at vatnorkuútbyggingin er liðug, siga stigtakararnir til mótmælisskrivið.

# Bátatænastan selir stuttleikabát hjá ríkmanni



**Tann 53 føtur stóri báturin verður nú bjóðaður út til sølu á føroyska og íslendska marknaðinum**

STUTTLEIKABÁTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein ríkmaður í Dubai í Sameindu Arabisku Emiratunum, sum hevur havt avtalu við pólska verksmiðju um bygging av einum stórum stuttleikabáti, er ongantíð komin eftir bátinum, sum nú er liðugur og klárur at lata.

Hóast maðurin hevur goldið eina miljón krónur í bátinum, er maðurin ikki at finna, nú báturin er liðugur á verksmiðjuni.

Talan er um kendu verksmiðjuna – Galeon – sum byggir bátar av sama slagi, sum Perl, ið man vera ein hin nýggjasti av slagnum í føroyska flotanum av stuttleikabátum.

Tað er Bátatænastan í Havn, sum umboðar pólsku verksmiðjuna og hesar væl umtóktu stuttleikabátar í Føroyum og Íslandi.

Birgir Johannesen á Bátatænastuni sigur, at stuttleikabáturin, sum talan er um, er heilar 53 føtur til longdar.

- Báturin, sum er 16,28 metrar langur og 4,78 metrar breiður, er verdur 9 miljónir krónur, men verður nú seldur fyri 4,9 miljónir krónur í Føroyum og Íslandi.

Tað er Bátatænastan, sum hevur fingið hølvi bátin út til sølu í Føroyum og Íslandi.

- Báturin er á nógvar hátt serligur og bygdur til júst hendan kundan í Dubai, men nú báturin er liðugur, er maðurin burtur, sigur Birgir Johannesen.

Hann vísir á, at tey, sum hava áhuga fyri stuttleikabátinum, kunnu venda sær til Bátatænastuna og fáa ta kunning, ið tey ynskja.

- Tað eru fyritøkur, sum umboða Galeon, ið hava fingið hølvi at bjóða hendan bátin, sum ikki er heintaður, til sølu, sigur Birgir Johannesen.

